## Össur í øðini



Íslendski uttanríkisráðharrin, Össur Skarphéðinsson, er í øðini inn á svenska fíggjarmálaráðharran, Anders Borg, sum hevur sagt, at íslendingar kunnu ikki skáka sær undan sínum skyldum bara við at halda fólkaatkvøðu um tað. Össur Skarphéðinsson sigur við Svenska Dagbladet, at Anders Borg hevur als ikki skilt, hvat íslendska fólkaatkvøðan snúði seg um. Anders Borg hevur eisini sagt, at Svøríki hevur roynt at hjálpa Íslandi sum best, men hesum tykist íslendski uttanríkisráðharrin ikki vera samdur við honum í.

## Føroyskt virki av knóranum

Í meiri enn eina øld hava fólk arbeitt fisk hjá felagnum Aurora A/S í Esbjerg, men nú er tað søga. Blaðið Jydske Vestkysten skrivar í dag, at felagið er lýst á húsagang, og at tey meiri enn 100 arbeiðsfólkini eru uppsøgd. Aurora A/S fór í gjaldssteðg fyri einum góðum mánaði síðani, og royndir at bjarga felagnum góvu einki úrslit, sum tí er lýst á húsagang nú. Øll liðslan í Aurora A/A er føroysk. Arne K. Olsen, fyrrverandi grannskoðari, hevur verið nevndarformaður, og sonur hansara, Gisli Olsen, hevur verið í leiðsluni saman við Jóni Gunnarssyni.

# Stjórin fór knappliga frá

**Uttan nakra grundgeving fór Eyðfinn Reyðberg hóskvøldið frá sum stjóri í Norðoya Sparikassa**

STJÓRASKIFTI

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í morgun komu tíðindin út frá Norðoya Sparikassa, at Eyðfinn Reyðberg er farin frá sum stjóri í Norðoya Sparikassa. Varamaður hansara, Marner Mortensen hevur fyribils tikið yvir um stjóri.

Tað hevur verið torført í dag at finna orsøkina til, at Eyðfinn Reyðberg hevur sagt seg úr starvi.

Hann er ikki biðin um at fara frá, og hann nevndi onga orsøk í uppsøgnini, sigur John P. Danielsen, nevndarformaður.

Hann vil annars ikki gera fleiri viðmerkingar til sjálvt málið.

Tað skerst ikki burtur, at tað hevur gingið minni væl hjá sparikassanum tvey tey seinastu árini, og í fjør var hallið fyri skatt 36,2 mió. krónur og eftir skatt 38 mió. krónur.

- Tað er nevndin sjálvandi ikki nøgd við, men sparikassin er framvegis væl fyri. Solvensurin er væl oman fyri tað kravda, og likviditeturin tað tvífalda av tí kravda, sigur John P. Danielsen.

Seinastu tvey árini hevur Norðoya Sparikassi niðurskrivað umleið 90 mió. krónur upp á skuldarar og skeivar íløgur.

Eyðfinn Reyðberg hevur verið stjóri í Norðoya Sparikassa í 10 ár.



*Eyðfinn Reyðberg er nú leysur av Norðoya Sparikassa. Tá ið fólk siga upp ella verða uppsøgd á einum peningastovni, fara tey frá beinanvegin*

# Kirkjugarðsarbeiðið steðgað

**Skopunar kommuna byrjaði at grava fyri nýggjum kirkjugarð á einum øki, sum kommunan hvørki hevur keypt ella ognartikið**

SKOPUNAR KOMMUNA

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

At kalla einki leiði er eftir í kirkjugarðinum í Skopun, men tað dregur út við at gera nýggjan kirkjugarð.

Av tí at ikki ber til at víðka verandi kirkjugarð, samtykti kommunustýrið at gera nýggjan garð niðan fyri elsta kirkjugarðin.

Fleiri áttu lendi har, og kommunustýrið keypti teigarnar frá nøkrum eigarum, men ein eigari hevur ikki gjørt nakran handil við kommununa.

Hesin eigarin er Hans Marius Joensen.

- Eg vil fegin selja kommununi lendið, men eg seti sum treyt, at kommunan keypir alt stykkið hjá mær og ikki bara ein part. Eg havi fingið at vita, at tað kravið kann eg seta, tí selja eg bara ein part, verður hitt stykkið avskorið frá vegnum. Men tað kommunan sigur nei til at keypa als. Hon sigur seg ikki hava ráð til tað, sigur Hans Marius Joensen.



*Nýggi kirkjugarðurin skal gerast niðan fyri elsta kirkjugarðin. Kommunan hevur eisini keypt jørð oman fyri kirkjugarðin, tí har skulu parkeringspláss gerast*

*Mynd: Sandportal*

Aðrir eigarar hava selt jørð til kommununa fyri 60 krónur fermeturin, veit Hans Marius Joensen.

### Byrjaði uttan loyvi

Hann gjørdist ikki sørt skakkur, tá ið kommunan fór undir at grava fyri nýggja kirkjugarðinum inni á hansara stykki, tí tað hevði hann ikki givið loyvi til. Stykkið var hansara.

- Kommunan setti sostatt arbeiðið í gongd og hevði ikki tryggjað sær neyðugu loyvini, sigur Hans Marius Joensen.

Hann hótti síðan við at melda, og sakførari hansara boðaði borgarstjóranum Gerhard Lognberg frá, at syrgdi hann ikki fyri at fáa øll viðurskifti upp á pláss, fór hann at krevja fútaforboð sett.

Fyri nøkrum vikum síðan varð arbeiðið steðgað.

Tað seinasta, Hans Marius Joensen hevur frætt er, at fólk frá Matriklustovuni skulu koma suður til Skopunar at kanna viðurskiftini.

### Ov sein á veg

Eingin skilir, at kommunan ikki fyri fleiri árum síðan fór at hugsa um nýggjan kirkjugarð. Tað búgva so nógv gomul fólk í bygdini, so skjótt kann blíva neyðugt at kunna jarða fleiri fólk.

Hví kommunan er so sein á veg við nýggjum kirkjugarði, vil Gerhard Lognberg ikki tosa um. Hann sigur seg heldur ikki kennast við nakra hóttan um fútaforboð og vil als ikki tosa meira um kirkjugarðsmálið.

- Eg tími ikki hetta tvætlið, sigur Gerhard Lognberg.